# Fáa ongan tunnil á hesum sinni



*Kristján L. Möller, samferðslumálaráðharri, hevur lagt ætlanina um undirsjóvartunnil til viks*
*(Mynd: Alþingið)*

**Vestmannaoyingar mugu brynja seg við góðum toli, tí teir fáa ongan undirsjóvartunnil í hesum umfari**

SAMFERÐSLA

*Árni Joensen:*
*arni@sosialurin.fo*

Fríggjadagin jarðaði íslendski samferðslumálaráðharrin, Kristján L. Möller allar vónir hjá fólkinum í Vestmannaoyggjunum um ein undirsjóvartunnil millum oyggjarnar og meginlandið.

Nakrar dagar frammanundan hevði stjórnin fingið eitt upprit frá einum verkfrøðingafelag, sum hevði roknað seg fram til, at tað fer at kosta millum fimm og átta mia. krónur í okkara pengum at gera ein undirsjóvartunnil út í Oyggjarnar. Felagið gjørdi tó vart við, at tað er ivasamt, hvussu skilagott tað er at gera ein tílíkan tunnil, soleiðis sum tey jarðfrøðiligu viðurskiftini har á leiðini eru.

Og tað vóru júst kostnaðurin og tann jarðfrøðiligi ivin, sum gjørdu, at uppritið varð lagt í eina skuffu í samferðslumálaráðnum í Reykjavík. Ístaðin fyri hevur ráðharrin lovað vestmannaoyingum fleiri ferjutúrar inn á meginlandið.

Vestmannaoyingar eru misnøgdir við avgerðina hjá stjórnini at leggja tunnilsætlanina til viks í fyrstu atløgu. Elliði Vignisson, borgarstjóri, sigur við Morgunblaðið, at tilboðið um fleiri ferjufewrðir millum Oyggjarnar og meginlandið nøktar ikki tørvin, og tí vónar hann, at stjórnin fer at kanna tunnilsætlanina nærri og at taka hana fram aftur seinni.

Sosialurin Sosialurin Sosialurin Sosialurin Sosialurin Sosialurin Sosialurin Sosialurin





## PARTABRØV LÆKKAÐU

Í farnu viku lækkaðu partabrøv flest alla staðni um 5%. Tað, ið byrjaði lækkingina, var óvissa viðvíkjandi tapum hjá ymsum bankum orsakað av sonevndu sub-prime lántakarunum. Hetta eru lántakarar, sum hava vánaliga kredittmeting. Nakrir amerikanskir bankar hava verið fyri tapi av tílíkum lánum í seinastuni, og enn er ikki heilt vist, hvussu hvussu stór tap eru væntandi aftrat.

Roknskapirnir eru nú komnir væl áleiðis í USA. Har hava 313 av teimum 500 virkjunum í S&P 500 kunngjørt roknskap fyri 2. ársfjórðing. Í farnu viku løgdu Ford og Amazon fram bestu roknskapirnar. Ford økti inntøkurnar við 316% í mun til 2. ársfjórðing í fjør, og Amazon 280%. Hetta var nógv betur enn væntað, men tað var bert hjá Amazon, at tað hevði kurshækking við sær. Kursurin hækkaði 21%. Sum heild hava roknskapirnir verið góðir higartil. Í miðal eru inntøkurnar øktar 8% í mun til somu tíð í fjør. 204 av teimum 313 virkjunum hava kunngjørt betri roknskap enn væntað.

Her heima kunngjørdi Eik góðan roknskap við eini renting av eginognini á 34%. Kursurin lækkaði tó úr 776 til undir 740 í sera lítlum handli.

## DOLLARIN STYRKNAÐI

Dollarin styrknaði í farnu viku fyri fyrstu ferð í seks vikur. Hann hækkaði stívliga 1% í 5,43. Hetta er rættiliga áhugavert, eftirsum trupulleikarnir á partabrævamarknaðinum serliga stava úr USA. Nú bíða íleggjarar eftir arbeiðsmarknaðarfrágreiðingini, sum kemur fríggjadagin. Hon skal verða sera góð, um dollarin skal styrkna munandi meira hesa vikuna.

## RENTURNAR AFTUR LÆKKAÐAR

Lánsbrævamarknaðurin gjørdi enn eitt lop í farnu viku. 10-ára rentan lækkaði úr 4,50% til 4,44%. Í farnu viku sást sostatt týðiliga, hvussu íleggjarar fluttu pening úr partabrøvum og í lánsbrøv.

## HESA VIKUNA

Hetta verður væntandi eisini ein hendingarík vika á marknaðunum. Eyguni verða serlig havd við roknskapum og kursgongdini á partabrævamarknaðunum. Ristingarnar eru neyvan av enn.

**Vísital fyri norrøn partabrøv**




**Donsk 10-ára renta**




| Marknaðir | Kursur | +/- % |
|---|---|---|
| Norðurlond | 1421,51 | -5,12% |
| Alheims partabrøv | 8505,76 | -4,06% |
| Atlantic Petroleum | 1080,00 | -5,26% |
| Føroya Banki | 248,00 | + 2,9% |
| Eik | 739,00 | + 1,93% |
| KB Trygg Eurostoxx | 108,83 | -1,97% |
| USD | 543,25 | + 0,8% |
| JPY | 4,56 | + 2,53% |

Broytingarnar eru útroknaðar í mun til fyri viku síðan. Myndirnar vísa gongdina seinastu 3 mánaðarnar.
Greiningin er grundað á keldur, sum Kaupthing metir vera álítandi, men Kaupthing hevur ikki ábyrgd av, at tilfarið altíð er neyvt og nágreiniligt. Kaupthing kann heldur ikki ábyrgdast tapi ella líknandi, sum stendst av gerðum, ið hava støði í greiningunum í hesum tilfari.

Postsmoga 3090, Bókbindaragøta 8, 110 Tórshavn, Tel 351500, Faks 351501, kf@kaupthing.fo, www.kaupthing.fo

KAUPTHING BANK